# UMSÓKN UM YNSKINUMMARSPJØLDUR / AVMARKAÐ YNSKINUMMARSPJØLDUR

| | |
|---|---|
| Navn: | Føðingardagur og P-tal / V-tal: |
| Bústaður: | Tlf. nr.: |
| Postnr. staður: | |

At leggja til merkis viðvíkjandi samanseting av nummarspjøldrum.

**Rútarnir skulu altíð fyllast út frá vinstru, t.v.s. byrja í vinstru síðu. Teksturin verður settur mitt á spjaldrið.**
**Møguligt millumrúm verður víst við tómum rúti.**

1-2 rektanguler ynskinummarspjøldur til bil:




1 kvadratiskt ynskinummarspjaldur til bil ella motorsúkklu:




Viðmerkjast skal at pláss bert er fyri 5 bókstavum/tølum á kvadratisku ynskinummarspjøldrunum.

1-2 rektanguler avmarkað ynskinummarspjøldur til bil:




1 kvadratiskt avmarkað ynskinummarspjaldur til bil ella motorsúkklu:




GG! Stríður valda samansetingin móti rættindunum hjá øðrum, liggur ábyrgdin fyri møguliga brotið hjá umsøkjaranum.

Dagur: ____________________ Undirskrift: ________________________________________

## VERÐUR ÚTFYLT AV AKSTOVUNI

Umbiðið tann: ________________________ Útflýggjað tann: ________________________

____________________________ ____________________________

Váttað av deildarleiðara Stempul og undirskrift

SENDISTOVAN

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

**Treytirnar fyri ynski og avmarka nummarspjøldur eru at finna í kunngerð nr. 34 frá 14. apríl 1983 um skrásetingar av motorakførum.**

## YNSKINUMMARSPJØLDUR / AVMARKAÐ YNSKINUMMARSPJØLDUR

**§ 49 a.** Umsókn um ynskinummarspjøldur skal latast akfaraskránni á einum serligum oyðiblaði. Oyðublaðið skal vera undirskrivað persónliga av tí sum ynskir samansetingina ella undirskrivað sambært skrivliga fulltrú frá hesum. Fulltrúin skal viðleggjast. Saman við umsóknini skal umsøkjarin inngjalda upphæddina fyri rættin til ynskinummarspjøldrini umframt upphæddina fyri nummarspjøldrini.
*Stk. 2.* Eru fleir umsóknir um somu samanseting, verður samansetingin latin tí, hvørs umsókn er latin inn fyrst.
*Stk. 3.* Ynskinummarspjøldur skulu vera samansett av í minsta lagi 2 og í mesta lagi 6 føroyskum og/ella donskum bókstavum og/ella tølum. Samansetingar sum longur eru skrásettar kunnu ikki latast. Samansetingar mugu ikki vera ósømiligar ella kunna vera øðrum til ampa.
*Stk. 4.* Lýkur umsøkjarin treytirnar at fáa rættin til at nýta ynskinummarspjøldur, ger og útflýggjar akfaraskráin nummarspjøldrini til viðkomandi. Útflýggjan av ynskinummarspjøldrum er treytað av, at tað akfarið, sum ætlanin er at seta ynskinummarspjøldrini á, verður fráboðað til skrásetingar.

**§ 49 b.** Rætturin at nýta ynskinummarspjøldur kann ikki verða latin øðrum, jvb. tó § 16 a, stk. 3, og er galdandi í 8 ár frá útflýggjanini av nummarspjøldrunum. Rætturin kann leingjast móti gjaldi, sbr. ásetingar í ferðslulógini um gjøld. Umsókn um hetta skal vera innlatin innan tíðarskeiðið, rætturin er galdandi fyri, er farið, tó í fyrsta lagi 3 mánaðir innan.
*Stk. 2.* Tann, sum hevur rættin til eina samanseting, kann, tá ynskinummarspjøldrini eru avmeldaðið, innan 1 ár aftaná avmeldingina av nummarspjøldrunum, bíleggja samansetingina til skráseting til sama eigara. Um bíleggingin verður gjørd seinni, er rætturin til samansetingina burturdottin.
*Stk. 3.* Ynskinummarspjøldur, sum eru bíløgd eftir stk. 2, skulu verða avheintaði í seinasta lagi 6 mánaðir eftir bíleggingina og innan tíðarskeiðið, sum tær er galdandi fyri, er farið. Við bíleggingina verður upphæddin fyri nummarspjøldur inngoldið. Útflýggjan av bíløgdum ynskinummarspjøldrum er treytað av, at tað akfarið, sum ætlanin er at seta ynskinummarspjøldrini á, verður fráboðað til skrásetingar.

**§ 49 c.** Søkt kann eisini verða um avmarkaði ynskinummarspjøldur, har møguleiki er fyri at ynskja sær eina samanseting av tveimum bókstavum og trimum tilvildarliga valdum tølum. Umsøkjarin skal á umsóknini tilskila hvørja samanseting av bókstavum, ið søkt verður um, og akfaraskráin ásetur síðani 3 tøl.
*Stk. 2.* Tey rættindi og tær skyldur, sum sbrt. § 49 b eru galdandi fyri vanlig ynskinummarspjøldur, eru ikki galdandi fyri avmarkaði ynskinummarspjøldur.
*Stk. 3.* Gjaldið fyri avmarkaði ynskinummarspjøldur verður goldið við útflýggjan.

**§ 49 d.** Avgerðir, tiknar eftir §§ 49 a-c kunnu hóast § 4 ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

## GJØLD

Gjaldið fyri rættin til ynskinummarspjøldur er kr. 6000,-. Rætturin er galdandi í 8 ár. Gjaldið fyri rættin til avmarka ynskinummarspjøldur er kr. 1000,-.

Gjaldast skal á Akstovuni í Tórshavn, í peningastovni ella á posthúsinum áðrenn nummarspjøldrini verða útflýggjað.